


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 02 - 2013

# Dong stórt hall og risastóra skuld

Árið í fjør royndist stak illa hjá danska oljurisanum Dong Energy. Úrslitið var fýra milliardir krónur í halli. Harafturat vísir roknskapurin, sum er almannakunngjørdur í dag, at tann rentuberandi skuldin hjá felagnum vaks næstan 10 milliardir krónur í 2012 og er nú oman fyri 33 milliardir krónur. Forstjórin, Henrik Poulsen, sigur í viðmerking til roknskapin, at frameftir fer felagið at leggja dent á at hava avkast, og at í seinasta lagi í 2016 skal avkastið vera í minsta lagi 10 prosent. Henrik Poulsen leggur afturat, at inni í framtíðarvánunum er ein ætlan um at økja eginpeningin við minst seks milliardum krónum. Árið í fjør var heldur rokaligt hjá Dong. Í mars fekk forstjórin, Anders Eldrup, sekkin, tí hann sambært nevndini var farin út um sínar heimildir. Tómhentur fór hann tó ikki, tí tað gylta lógvatakið gav honum 17 milliónir krónur. Í kjalarvørrinum av málinum um forstjóran kom fram, at nakrir undirstjórar í Dong høvdu havt sera góðar lønar- og setanartreytir. Ein teirra var føroyingurin Rúni Róin, sum fekk 10 milliónir krónur við sær, tá hann fór frá sum fíggjarstjóri.